Kristoffur Kamban:

# Doyði 16 ára gamal sum blaðs



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*Kristoffur var ein vakur unglingi*

*Gravsteinurin*

Protokollin yvir tey, sum eru jarðað í gamla kirkjugarði er eitt áhugavert skjal. Her eru nógv kend nøvn, eisini slík, sum ikki hava fingið gravstein. Men fyrst og fremst lýsir protokollin, hvussu nógv livialdurin er broyttur. Vit hava hugt eftir tølunum fyri 1907, ella júst fyri 100 árum síðani. Hetta ár vóru 21 jarðarferðir. Átta av hesum vóru fólk undir 20 ár. Av hesum vóru tvey deyðfødd. Tað vóru bert trý, sum vóru yvir 70 ár. Eitt av hesum var Marin Mohr í Hoyvík, sum gjørdist 90 ár, sum má hava verið ein sera høgur aldur tá í tíðini. Miðalaldurin fyri tey grivnu var 37 ár, sum kanska er umleið helvtina av tí, hann er í dag.

Í kirkjugarðinum eru eisini nógv ung, sum ikki fingu møguleikan at gera seg galdandi. Hesa ferð fara vit at umrøða ein ungan drong, sum doyði knapt 17 ára gamal, men sum kortini hevur eina søgu.

Talan er um Kristoffur Kamban, sum var føddur 30/9 1916. Hann doyði 26/8 1933 og verður jarðaður tríggjar dagar seinni.

Hann var sonur Hanus Kamban, lærara í Havn (f. 8/3 1879 d. 1/4 1946) og Mariu Kamban, fødd Ziska (f. 9/5 1885 d. 4/8 1952).

Hanus og Maria høvdu sjey børn nevniliga:

Elisabeth (Betti), gift Andreassen (f. 2/10 1908 d. 30/9 1985);

Hjørdis, gift Djurhuus (f. 27/4 1910 d. 3/7 2006);

Johanna, gift Ziska ( f. 25/9 1911 d. 3/12 2004);

Janus Kamban (f. 10/9 1913);

Elseba (Ebba), gift Petersen (f. 30/1 1915);

Kristoffur (Stoffa) Kamban (f. 30/9 1917 d. 26/8 1933)
Hans Marius (Mara) Kamban (f. 11/11 1919 d. 7/10 1986).

Harumframt høvdu tey í fostur Irenu (Rúnu) Rasmussen, dóttir Lisu og Sofus (hjá Stinu) Rasmussen, ið sum lítil smágenta misti mammu sína.

Kristoffur var uppkallaður eftir mammubeiggja sínum Kristoffur Ziska, ið 18 ára gamal gekk burtur í 1912, við sluppini Oliviu, sum mammubeiggi hansara, hin navnframi Napoleon í Dali átti og førdi.

## Evnaligur drongur

Kristoffur hevði sum barn haft sponsku sjúkuna og kom hann seg ongantíð rættiliga av sjúkuni.

Hann var lættur av lyndi og skemtingarsamur, og tað lá væl fyri hjá honum við tí bókliga.

Í realskúlanum gekk hann í klassa við Regin Dahl, Jens Guttesen, Leivur Jóanesarson og Ebbe Müller, meðan genturnar vóru Ása Christiansen, Helena Enniberg, Inger Højgaard, Inge Lützen, Hanna Poulsen, Aase Ringberg og Ingeborg Zachariasen.

Av hesum liva tríggir av næmingunum enn. Tær eru Ása Christiansen, gift Michelsen, Ingeborg, gift Rasmussen og Aase Ringberg. Hon er dóttir amtmannin, sum tá var í Føroyum, Hjalmar Ringberg. Aase flutti aftur til Danmarkar, men hjartað lá eftir í Føroyum. Hon tosar føroyskt, er limur í Føroyingafelagnum í Ballerup og ferðast javnan higar.

Í 2004 skipaði hon á Hotel Hafnia fyri eini 70-ára samkomu fyri tey, sum fingu realprógv í 1934. Tá vóru fimm eftir av flokkinum. Umframt tær tríggjar eisini Regin Dahl, sum búði niðri og Hanna við Høgadalsá. Men júst tann dagin samkoman skuldi vera, gjørdist Hanna illa sjúk og doyði nakrar dagar seinni. Regin doyði fyri kortum.



*Kristoffur saman við vinum: F.v. Gunnar Isholm, Kristoffur Kamban, Marius Ziska, Bent Restorff, ókendur*

## Fóru at geva út skúlablað

Hetta var ein livandi klassi við einum sera góðum samanhaldi millum dreingirnar, sum í 1933 fóru undir at geva út skúlablaðið Glámlýsi, tí sum sagt verður í innganginum til fyrsta nummarið av blaðnum:

*Nógv halda tað vera stórt spell, at skúlabørn ikki hava sítt egna blað, tí tað er jú eitt og annað, sum tey vildu ført fram og sum kanska ikki hevði verið so væl hóskandi at komi fram við í øðrum bløðum.*

Av Glámlýsi kom bert út 1. árg. numrini 1, 2 og 3. Bløðini vórðu prentaði á prentsmiðju B. Z. Jensens, sum var mammubeiggi Kristoffurs og hevði til húsa í grannahúsinum í Jónas Bronckgøtu. Sum útgevari stendur felagið Glámlýsi, og eru bløðini til skjals á Landsbókasavninum.

Sum árið leið sjúklaðist Kristoffur, og kom hann um summarið niðan á Sanatoriið at liggja. Tað gekk skjótt tann skeiva vegin og longu tann 26. august doyði hann haruppi bert 16 ára gamal.

Nakað eftir at Kristoffur var deyður, sóknaðist Rasmussen lækni á Eiði eftir næsta nummari av blaðnum, sum hann helt vera eitt áhugavert tiltak. Her mátti mamman svara Rasmussen sum var, at "redaktørurin" ímeðan var deyður og jarðaður, so frá hansara hond komu ikki fleiri bløð.

Av systkjunum hjá Kristoffuri eru á lívi Janus og Ebba, sum bæði eru farin væl uppum tey níti.

Ebba veit at siga, at vinmennirnir komu nógv saman og vitjaðu teir Kristoffur dúgliga á Sanatoriinum. Teir vóru kátir dreingir og høvdu ilt við at yvirhalda vitjunartíðirnar, so viðhvørt mátti talast at.

Einaferð hon í seinri árum á Havnargøtum kom á tal við Jens Guttesen, kom tosið inn á vinmannin Stoffa, og fortaldi Jens henni tá, at hann varð biðin at bera, tá ið Kristoffur fór til gravar, og hevði mamma hansara til høvið keypt honum klæðning. Hetta var fyrstu ferð hann var í tílíkum klæðnabúnað og føldi hann seg í honum sum rættan mann.

Janus veit at siga frá, at hann fór niðan at vitja bróðurin saman við Kristinu Kristiansen úr Gøtu, sum tey kendu, og sum var fotografur. Tað var ætlanin at taka eina mynd av Kristoffur, men var hann seingjarliggjandi, tá ið tey komu, og valdu tey at lata vera.

Janus sigur eisini frá, at fáar dagar, áðrenn hann doyði, kom Kristoffur oman at vitja:

*Vit spákaðu okkum ein túr yvir á Skansan og sótu har og prátaðu saman um mangt og hvat. Ikki vardi tað meg, at hann hevði so stutt eftir.*

# tjóri

Við deyða Kristoffurs gjørdist eitt tómrúm í familjuni, ein saknur sum kanska kámast við árunum men sum ongantíð hvørvur.

Sálmarnir við jarðarferðina vóru sum vera man á donskum. Lat okkum enda hesa frásøgn við seinasta ørindi í seinasta sálmi, sum sungin varð á grøvini:

*En liden Stund,*
*et stille Blund,*
*da skal alt Mørke vige;*
*i Morgengry*
*foruden Sky*
*Guds Sol den ny*
*os hilser i Guds Rige.*



*Foreldur og systkin. Aftara rað fv. Janus, Ebba, Marius, Hanna. Fremra rað: Betti, Maria og Hanus, Hjørdis, Rúna*

## Mammubeiggin og navnin fórst við Oliviu

Vit halda tað vera ein part av hesi søgu at taka við lagnuna hjá tí Kristoffer, sum Kristoffer Kamban varð uppkallaður eftir.

Poli í Dali, sum ommubeiggi Kristoffer Kamban og mammbeiggi Kristoffer Ziska, hevur eina áhugaverda søgu.

Poli var føddur 25. mars 1868. Sum ungur var hann harður mótstøðumaður av tí, sum gamli Sloan stóð fyri, og hann plagdi - saman við øðrum - at órógva útimøtini hjá honum á Doktaragrund. Hann fór út at sigla sum ungur, og 20 ára gamal varð hann umvendur. Tá ið hann kom heim aftur gjørdist hann ein tann fremsti stuðulin hjá teirri tá nýggju og lítlu brøðrasamkomuni.

Poli gjørdist ein av okkara fremstu vinnuligu slóðbrótarum eins og beiggin Jens í Dali. Hann byrjaði at sigla við fiski til Hollands, og í 1906 varð hann biðin um at standa á odda fyri eini fiskirannsóknarferð til Grønlands. Eisini royndi hann trolveiðu undir Føroyum við „Atlantu", og mundi hetta vera fyrsta trolroyndin undir Føroyum. Fyri síni avrik gjørdist hann riddari av Dannebrog, tá ið Fríðrikur 8. vitjaði í Føroyum í 1907.

Hann var eisini ein av undangongumonnunum, tá ið mjólkaforsýningin varð sett á stovn í 1908, og fyrsta mjólkasølan var í húsinum hjá Pola, Arnes Minde, sum er niðast í Bringsnagøtu móti Fiskimannafelagnum og beint við dómkirkjuna.



*Poli í Dali, slóðbrótari á sjógvi og landi*



*Kristoffer Ziska var mammubeiggi Kristoffer Kamban. Hann doyði eisini blaðungur. Hann fórst við Oliviu í 1912.*

Tað er lítið og einki, sum kann sigast um lagnutúrin hjá Oliviu í 1912. Áðrenn hann fór avstað, var hann inni hjá William Sloan at siga farvæl, og hetta mintist Andrew, sonur gamla Sloan, væl. Poli ætlaði, at hetta skuldi vera hansara seinasta ár á sjónum, so skuldi hann fara at starvast á landi.

Tann 9. mars 1912 legði hann frá landi við 14 røskum monnum umborð. Um páskirnar komu teir inn á Reykjavík, og Poli talaði trý kvøld uppí slag í Frelsunarherinum. Teir fara út aftur, og nakrar dagar eftir brestir eitt herviligt ódnarveður á, og einki hoyrdist aftur frá teimum.

Tað seinasta, sum beinleiðis er frætt frá Pola, er bræv, sum hann hevur skrivað umborð á Oliviu 23.3 1912. Tað er skrivað til August Vang í Kaldbak, sum var samkomufelagi hjá Pola. Brævið er sera drúgt, men tað er bert um andalig viðurskifti. Tað var endurgivið í Leirkerinum nr. 5-6 í 1986.

Olivia, kona Pola, var donsk. Tey bæði áttu 9 børn. Tann elsti kallaðist Arne, og hann doyði ungur. Húsið Arnes Minde er tískil uppkallað eftir honum.

Tá ið Poli var deyður, flutti konan til New Zealands við børnunum.

Ein dóttir livir enn, 95 ára gomul. Hon eitur Vilborg, og verður kallað Billy. Sum ung gjørdist hon vakurleikadrotning í New Zealandi, har hon enn býr. Hon hevur framvegis samband við ættina í Føroyum.

*Keldur:*
*Tormóður Djurhuus*
*FF-blaðið*



*Olivia. Við henni fórust Poli og Kristoffer*

## Næstu ferð

Næstu ferð verður frásøgnin um Hanne og Jørgen Frands, omma og abbi rithøvundan Jørgen Frants Jacobsen.






*Hetta er tað seinasta, sum frættist frá Oliviu.*


GLÁMLÝSI
1. árg. 1933 Nr. 3

*Hetta gjørdist seinasta útgávan av Glámlýsinum*

## Brot úr Glámlýsinum

Vit vilja endurgeva nøkur fáa brot úr blaðnum sum vísir, at her hevur verið bæði skemt og álvari

### Úr blaði nr 2

...Einans at skriva um eitt ella annað úr Tórshavn verður alt ov fátæksligt. Eingin bygd í Føroyum hevur so lítið at bjóða børnum sum Havnin. Her er so oyðið, at tað kann ganga lang tíð av árinum, vit síggja ikki eina kráku. Vilja vit síggja ein hampiligan havhest, mega vit fara oman á bryggjuna og standa har, til Jákup Andrias úr Skopun kemur, tí hann hevur ofta havhestar við.

Nei, tit eiga ta vøkru natúr; mangar staðni er so slætt niðri við sjógvin, at einki eitur at detta niðurfyri. Tit sleppa eftir torvi, og tað er gamalt orð, at eingin veit, hvussu stuttligt tað er at bera torv, fyrr enn hann einki torv eigur…

Greinin endar við eini áheitan á lesarar uttan fyri Havnina at senda tíðindini til blaðið.

### Á Suðurlandinum

Nú eru flest øll skipini farin á Suðurlandið og liggja teir nú har yviri og baksa, pápar, synir og brøður. Heima sita mammur, systrar og brøður. Gongur ein niðri við skipini, tá ið teir gera til, síggjast millum menninar mangir so ungir og lítlir, at teir neyvan hava gingið til. Tað er kalt og ótídligt hjá teimum, og ikki er undur í, um teir óttast, táið skipini hella so, at alt læborðið er undir kavi og dekkið undir líka at kappanum. Teir skulu royna at draga upp fiskar, ið eru næstan so stórir sum menn.

(Mammurnar) vita eitt, at sjáldan koma allir aftur, ið avstað fara. So sjáldan, at flestu menn eru tungir í huga og álvarsamir, tá ið nærkast at faring.

Og hvat líða ikki mammur við at lata tað besta tær eiga, menninar, og tað sárasta tær eiga, hesar ungu lítlu synirnar, ið tær fyri bert fáum árum síðan hava sitið við á knøunum og kelað fyri. Tær munnu bæði bløða og gráta.